# Varðhaldsfongslaður í 50 ár

Tað var ein 80 ára gamal maður, sum langt um leingi slapp út aftur úr fongslinum, eftir 50 ára varðhaldsfongsling á Sri Lanka. DP James varð varðhaldsfongslaður í august 1958, eftir at hava sært pápa sín við knívi. Eftir eina innlegging á eini psykiatriskari klinikk, varð hann sendur aftur í fongsul, og myndugleikarnir gloymdu hann har. Hann kom aldri fyri ein dómara. Málið varð ikki uppafturlatið, fyrr enn gamli maðurin noyddist á sjúkrahúsið. – hann er eitt offur fyri óvirkandi bureaukratinum, sigur advokaturin, sum nú er settur á málið, og krevur 67.000 kr fyri frátikna lívið. Tað eru góðar 1300 kr um ári fyri varðhaldsfongslingina.



# Trúarbólkar felags front móti Darwin

Bólkan innan bæði kristindóm, islam, jødadóm og smærri religiónir sum Hare Krishna arbeiða í hesum døgum saman um at fáa trúnna á ein "intelligentan designara", sum stendur handan skaparaverkið. Hetta er mótsvar til menningarlæruna hjá Darwin. Trúgvin á ein "intelligentan designara" sigur, at lívið og skapanarverkið er so fantastiskt og samansett, at tað ikki kann forklárast við menningarlæruni. Tað má tí vera ein størri skapari handan skapanarverkið. Hetta ástøði um "intelligent design" fekk av fyrstan tíð fótfesti ímillum religiøsa høgravongin í USA, men hevur nú breitt seg til nógvar trúarbólkar kring heimin, sum samstarva tættari og tættari

Granskarar:

# Tí sakk Estonia

**Ein nýggj teldueftirgerð av, tá Estonia sakk, vísir, at fleiri skeivar avgerðir førdu til vanlukkuna, sum kostaði 852 fólkum lívið**

Ov nógv ferð í ringa sjógvinum og ein miseydnað roynd at bjarga skipinum við at snara runt, førdi sambært týskum granskarum til, at Estonia sakk, skrivar Der Spiegel.

Tað er ein bólkur av granskarum í Hamburg, sum við mest framkomnu tøknini hava gjørt eina teldueftirgerð av vanlukkuni fyri svensku myndugleikarnar. Lagnutunga náttin 28. september 1994 hevði skiparin gjørt av at sigla við fullari ferð í fýra metra høgu aldunum í Eystursjónum, fyri at vinna inn aftur eina seinking.

Nógva ferðin í ringa sjógvinum førdi til, at bovportrið og bilrampan loysnaðu.

Eftir hetta royndi manningin at stabilisera skipið við at leggja tað upp í vind og aldu. Vanliga skuldi hetta givið góða meining, men centrifugalmegin frá aldunum, sum longu vóru fossaðar inn á dekkið, gav skipinum enn meiri slagsíðu, meðan sjógvurin varð trýstur út í stýriborð.

Sambært granskarunum hevur maningin eftir øllum at døma ikki vitað av, hvat var hent við bovportrinum, tá manøvran varð framd. Bovportrið sást nevniliga ikki av brúnni, sum lá forskotin fimm dekk hægri.

Í kanningini útiloka týsku granskararnir samstundis, at ein spreinging skal hava verið umborð, nakað, sum seinastu 14 árini hevur verið kjakast nógv um.

Bara 137 fólk vórðu bjargað tá Estonia sakk.

# Hálv milliard meir í lønum

**Tað vórðu útgoldnar 501 mió. meira í lønum í 2007, samanborið við 2006. Nú nýtt ár er byrjað, kunnu samlaðu lønargjaldingarnar fyri 2007 gerast upp. Hetta vísir at næstan 7 mia. vórðu útgoldnar í lønum í fjør. Tað er ein vøkstur uppá hálva mia. í mun til 2006, sum er 8% meira, sigur Hagstovan**

LØNARGJALDINGAR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Serliga innan privatu tænastuvinnuna eru fleiri pengar goldnir í lønum í fjør í mun til 2006*

*Tilvildarlig mynd*

Tilfeingisvinnurnar hava minsta vøksturin, bert 1%. Her er tað fiskavirking og ráevnisvinna, sum eru í minking, meðan tað serliga er alivinnan, sum veksur nógv. Í alivinnuni eru goldnar 26 mió. meir í lønun, ein vøkstur uppá 28%. Fiskiskapur, sum stendur fyri 65% av lønunum í tilfeingisvinnunum, hevur ein lítlan vøkstur uppá 2%.

Størsti vøksturin er innan privatu tænastuvinnurnar. Har eru 13% fleiri lønarkrónur í 2007. Her er tað serliga sjóflutningur og figging og trygging, sum hava ein stóran vøkstur, 21 og 20%, men eisini gistihúsog matstovu-virksemi er vaksið nógv og hevur goldið 14% meir út í lønum.

Í byggivinnuni eru 492 mió. goldnar í lønum í fjør, tað eru 54 mió meir enn árið fyri, ein vøkstur uppá 12%. Samlað er ein vøkstur uppá 11% innan bygging og ídnað.

Fyri almennar tænastur eru goldnar 6% meir í lønum í 2007 samanborið við 2006.

Nú árið er uppgjørt, kann samanberast við gongdina seinastu 10 árini. Her síggja vit, at vøksturin í lønargjaldingunum seinasta árið liggur eitt sindur yvir miðalvøksturin seinastu 10 árini, sum hevur verið 6,8%. Størsti vøksturin var frá 2000 til 2001, tá lønirnar vuksu næstan 13%.

Eisini sæst, at tað er ikki ein javnur vøkstur hetta tíðarskeiðið. Fram til 2003 var stórur vøkstur í lønunum, í miðal 9,9%. Síðan koma 3 ár við lítlum vøkstri, 1,5% í miðal og seinastu 2 árini hava vit so aftur sæð ein vøkstur uppá 7-8%, skrivar Hagstova Føroya á heimasíðu sínu.

| | 2006 | 2007 | munur | % |
|---|---|---|---|---|
| Fiskivinna o.o. ráevnisvinna | 1.460 | 1.477 | 17 | 1 |
| Byggivinna o.o. tilevnisvinna | 861 | 957 | 96 | 11 |
| Privatar tænastuvinnur | 1.981 | 2.230 | 250 | 13 |
| Almenn o.o. tænasta | 2.140 | 2.279 | 139 | 6 |
| Samlaðar lønarútgjaldingar | 6.442 | 6.943 | 501 | 8 |

# Ide Møblar fyri fimtu ferð

**Fyri fimtu ferð út av seks møguligum hevur Ide Møblar vunnið kappingina »Ársins Handil«, sum VikuBlaðið skipar fyri**

ÁRSINS HANDIL

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Fimtu ferð út av seks møguligum vann Ide Møbar heitið Ársins Handil*

Ide Møblar eru líka einaráðandi í kappingini »Ársins Handil«, sum Manchester United var í Premier League í 90-unum.

Til Gallaveitsluna á Hotel Føroyum fyri 300 gestum var avdúkað, at Ide Møblar fyri fimtu ferð var kosin »Ársins Handil« av lesarunum hjá VikuBlaðnum.

- Vit upplýsa ongantíð, hvussu nógvar atkvøður hvør handil fær. Heldur ikki handlarnir fáa hetta at vita. Men Ide Møblar í Havn gjørdist nummar eitt, Berglon í Saltangará nummar tvey og Bakaríið hjá Jórun í Klaksvík nummar trý, sigur Terji Nielsen frá VikuBlaðnum.

Terji Nielsen sigur eisini, at tað ongantíð hava verið so nógvir lesarara, sum hava tikið lut í atkvøðugreiðsluni, sum í ár.

Hetta er sætta árið at VikuBlaðið skipar fyri hesari kappingini, og sum nevnt fimta árið at Ide Møblar vinna. Kappingin fer fram á tann hátt, at veljarar VikuBlaðsins atkvøða um sms-skipanina upp á tann handilin, ið teir meta skal hava hendan heiðurin, og talt verður upp sum til allar aðrar kappingar.

Í sambandi við kappingina burturlutaði VikuBlaðið eisini ein stóran vinning millum teir lesarar, sum tóku lut í atkvøðugreiðsluni. Vinningurin var ein Kia Ceed bilur, og hepni vinnarin var 28-ára gamli Finnbjørn Danielsen úr Árnafirði.